Bilar

Nr. 88 • hósdagur • 12. mai 2005 • 79. árg.

# Nýggir Porsche 911 Carrera Cabriolet




*Porsche 911 Carrera og 911 Carrera S Cabriolet við ávikavist 235 og 355 hk.*

**Porsche 911 hevur verið á marknaðinum í meira enn 40 ár. Nú stutt eftir at tveir nýggir 911 Carrera í coupé útgávu komu á marknaðin í fjør, eru tveir 911 Carrera cabriolet eisini komnir á gøtuna**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Meira enn 40 ár eftir at Porsche 911 fyrstu ferð kom á marknaðin, hava teir ongantíð verið betur umtóktir enn í dag.

Í fjør komu 911 Carrera í tveimum nýggjum coupé útgávum, og í ár eru tveir nýggir 911 Carrera Cabriolet komnir á marknaðin. Talan er um 911 Carrera Cabriolet við

3,6 litur boxermotori og 325 hk, og 911 Carrera S við 3,8 litur boxermotori við 355 hk. Teir koyra frá 0-100 km/t upp á ávikavist 4,9 og 5,2 sek og toppferðin er ávikavist 285 og 293 km/t.

Báðir bilarnir eru sera framkomnir við t.d. aktivari fjaðraskipan, PSM (Porsche Stability Management), PCM (Porsche Communication Management) og koyrieginleikum á sera høgum støði.

Kalesjan kann latast upp og aftur upp á 20 sekund

# Ford T »treff« í Føroyum

**Annan hvítusunnudag 16. mai kemur eitt danskt ferðalag við nøkrum sera áhugaverdum bilum á vitjan. Talan er um 9 Ford T, har tann elsti er frá 1914**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Teir fara ivaleyst at vekja ans á føroysku vegunum, teir 9 gomlu Fordarnir, ið koma við Norrönu mánamorgunin.

Elsti bilurin í danska ferðalagnum verður ein Ford T frá 1914, hinir vera frá 20-unum.

Ferðalagið fer fyrst í Norðoyggjar, har tey skulu búgva á Viðareiði í tríggjr dagar, síðan fara tey til Gjáar, har tey skulu yvirnátta einaferð.

Frá fríggjadegnun 21. mai til hósdagin 26. mai, tá tey fara heim aftur til Danmarkar, búgva tey á Vallarheiminum við Hotel Føroyar í Havn.

Eigararnir av bilunum eru limir í Dansk Ford T klub, ið hevur ein føroyskan lim, tað sum Hans Elmar Poulsen í Vatnsoyrum, ið hevur ein Ford T frá 1915.




*Hans Elmar Poulsen í sínum Ford T frá 1915*